## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Út á seinnapartin lækkar hann niður í útsynning og um kvøldið regn. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og sólglottar, men møguliga okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sum frálíður regn av og á. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, týsdagin upp í hvassan vind. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

# Nú verður vetur í Útvarpinum

**Mánadagin fer Útvarpið undir at senda eftir vetrarskránni. Fleiri nýggjar sendingar eru á skránni, men fleiri av teimum góðu, gomlu verða eisini at hoyra aftur. Lurtaraynski og lurtaraprá fáa nú munandi betur pláss**

VETRARSKRÁ
*Tíðindaskriv*

Útvarpið fer nú undir vetrarskránna. Mánadagin verða seinastu broytingarnar settar í verk, og tað hevur við sær, at senditíðin verður longd, og at nýggjar sendingar verða at hoyra.

Í vetur fer ÚF at senda til kl. 23 á kvøldi frá mánadegi til hósdag. Fríggjakvøld verður sent til á midnátt, og leygarkvøld verður sent til kl. 01. Sunnukvøld fer útvarpið at gevst kl. 21.

Fleiri av teimum góðu, gomlu vetrarsendingunum verða aftur at hoyra, eitt nú Heimabeiti, Viðurgerði, Tilvera, Fólk og Frítíð, Afturhvarv og Crescendo.

Frá mánadegnum verður barnaútvarp aftur hvønn morgun. Í Barnaløtuni, sum verður send aftur kl. 18.00, verða ljóðleikir, prát við børn, kappingar og mangt annað. Tónatummas fer aftur at sita við mikrofonina annan hvønn leygarmorgun kl. 10.10, og í barnasendingini sunnumorgun verða lisnar søgur úr Skýmingarløtum.

Í sendingini Tit skriva, vit spæla verður nú størri rúmd fyri lurtaraynskjum, tí mánadag og mikudag verður henda lurtarasendingin tveir tímar. Fríggjadag verður Máltráðurin eisini tveir tímar.

### Nógv nýtt á skránni

Nógv nýtt verður eisini á skránni í vetur. Hvørt mánakvøld kl. 19.00 fer Eyðun Klakstein at skipa fyri einum mentanartátti. Í sendingini er ætlanin í samrøðum, reportasjum og orðaskifti at viðgera tað, sum í breiðum týdningi rørist í føroyskum mentanarlívi.

Fríggjakvøld kl. 19.00 eitur sendingin Vespan. Hetta er nýggj sending, har vit fara at líta aftur á vikuna. Nøkur av evnunum, sum hava verið frammi í tíðindum og aktuellum, verða tikin fram, skiftandi viðmerkjarar fara í speisemi at viðgera dagsins mál, og Ólavur Øster fer at stjórna fasta húsaorkestrinum.

### Ungdómssending

Leygarkvøld verður spurnarkappingin aftur fastur táttur á skránni, og í vetur fara fjølmiðlafólk at royna seg. Tað verður Gunnar Nolsøe, sum skal gera hesa sending

Í fleiri ár hevur útvarpið ásannað, at tilboðið til ungdómin ikki hevur verið nóg gott. Í vetur hevur tað eydnast at koma á mál við eini ungdómssending. Elin í Stórustovu fer at skipa fyri sendingini Zip, sum er sending fyri bæði dreingir og gentur.

Í flestu sendingunum er ætlanin at taka fram eitt ávíst evni, sum rørist millum tey ungu og viðgera tað nærri. Tónleikurin verður bæði nýggjur og eldri poppur, og ætlanin er í stóran mun at brúka ÚF-netvarpið í samskiftinum við tey ungu.

Hetta eru bert nakrir fáir av teimum mongu tættunum, sum útvarpið fer at bjóða lurtarunum í vetur. Hvørja viku verður sent í 110 tímar, og útvarpsmanningin vónar við hesi vetrarskránni at kunna bjóða lurtarunum eina fjølbroytta, góða og undirhaldandi útvarpsskrá.



*Manningin, sum fer at gera Góðan morgun, Føroyar: Elis Poulsen, Øssur Egholm, Jákup Magnussen, Kári Olsen og Bjarni Mohr*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | 13 |
| Halifax | 21 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 15 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 25 |
| Athen | – |
| Malta | 25 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 29 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 29 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1011 hPa. vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og dýpist.




Lágtrýstið við Vestur-Noreg hvørvur í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst vestan fyri Ísland fer eystureftir og verður við Føroyar leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/08 kl. 06⁰⁰– 25/09 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,2°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 24/09 kl. 06⁰⁰–25/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 78,9 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

26. sept.: Tendring
28. sept.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmannasundi | | Mykinesfirði | | Nólsoyarfirði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvannasundi | | Fugloyarfirði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 26. sep | 07.27 | 19.50 | 06.27 | 18.50 | 06.42 | 19.05 | 09.27 | 21.50 | 10.27 | 22.50 | 05.42 | 18.05 | 04.42 | 17.05 | 07.42 | 20.05 | 08.42 | 21.05 | 07.12 | 19.35 | 08.27 | 20.50 |
| 27. sep | 08.11 | 20.32 | 07.11 | 19.32 | 07.26 | 19.47 | 10.11 | 22.32 | 11.11 | 23.32 | 06.26 | 18.47 | 05.26 | 17.47 | 08.26 | 20.47 | 09.26 | 21.47 | 07.56 | 20.17 | 09.11 | 21.32 |
| 28. sep | 08.55 | 21.17 | 07.55 | 20.17 | 08.10 | 20.32 | 10.55 | 23.17 | 11.55 | — | 07.10 | 19.32 | 06.10 | 18.32 | 09.10 | 21.32 | 10.10 | 22.32 | 08.40 | 21.02 | 09.55 | 22.17 |
| 29. sep | 09.43 | 22.09 | 08.43 | 21.09 | 08.58 | 21.24 | 11.43 | — | 00.17 | 12.43 | 07.58 | 20.24 | 06.58 | 19.24 | 09.58 | 22.24 | 10.58 | 23.24 | 09.28 | 21.54 | 10.43 | 23.09 |

5 707265 100050 >